| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 05/2016 |
| Býráðsfundur nr. | 26. mai 2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 26. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. mai 2016 um innkalling til fundar.

**<u>Møtt vórðu:</u>**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Jann N. Toftegaard

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 42 og 43/2016 vórðu viðgjørt og avgerðir tiknar.

**<u>Mál nr. 42/2016.</u>**

## <u>Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2015.</u>

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 18. mai 2016 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2015 frá Januar – løggilt grannskoðaravirki, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 18. mai 2016 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2015.

Ongar eykajáttanir eru framdar í fíggjarárinum, men hevur býráðið samtykt 2 tekniska umflytingar á kr. 331.250,00 tilsamans, sum eru í øki 5 mentan og frítíð við kr. 131.250,00 og á øki 6 teknisk mál við kr. 200.000,00, og eru tær tær fíggjaðar við umflytingum millum rakstrarstøð.

Roknskapurin vísir eitt avlop av gjaldføri frá rakstri á kr. 10.344.000,00, móti einum mettum halli upp á kr. 13,0 mió sambært fíggjarætlanina.
Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum umflytingum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | 8.100.548,00 | 8.071.000,00 | 30.000,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | 20.189.000,00 | 20.535.000,00 | -346.000,00 |
| 3 | Børn og ung | 11.655.000,00 | 13.170.000,00 | -1.515.000,00 |
| 4 | Undirvísing | 2.983.000,00 | 3.857.000,00 | 874.000,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | 6.560.000,00 | 6.182.000,00 | 378.000,00 |
| 6 | Teknisk mál | 7.088.000,00 | 5.536.000,00 | 1.552.000,00 |
| 7 | Kommunal virki | -3.502.000,00 | -3.770.000,00 | 268.000,00 |
| 1-7 | | **53.074.000,00** | **53.581.000,00** | **-507.000,00** |
| | **Íløgur:** | | | |
| 1 | Kommunal fyrisiting | 0,00 | 0,00 | 0,00 |
| | Almanna- og heilsumál | | | |
| | | 6.269.000,00 | 160.000,00 | 6.429.000,00 |
| | Børn og ung | 88.000,00 | 300.000,00 | -212.000,00 |
| | Undirvísing | 1.283.000,00 | 2.440.000,00 | -1.157.000,00 |
| | Mentan og frítíð | 2.749.000,00 | 2.350.000,00 | -399.000,00 |
| | Teknisk mál | 8.005.000,00 | 8.620.000,00 | -1.075.143,00 |
| | Kommunal virki | 10.010.462,00 | 8.620.000,00 | -615.000,00 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Økið 1-7 tilsamans** | **15.943.000,00** | **27.970.000,00** | **-12.027.000,00** |
| **§1 - § 7 tilsamans** | **69.017.000,00** | **81.551.000,00** | **-12.534.000,00** |
| **§ 20 Inntøkur** | **-79.361.000,00** | **68.551.000,00** | **-10.810.000,00** |
| | | | |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **-10.344.000,00** | **13.000.000,00** | **-23.344.000,00** |

Annars eru íløgurnar útgreinaðar á blað síðu 7 í grannskoðaða roknskapinum.

Lántøka er framd í 2015 upp á kr. 8,0 mió, metta í samsvari við góðkendu fíggjarætlanina fyri 2015.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 18. mai 2016, og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommunununar fyri 2014 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

Við tað at grannskoðarafrágreiðingin ikki varð tøk til fundin av ávísum grundum, so varð avtala gjørd við Fróða Sivertsen, høvuðsgrannskoðara kommununar um at hann kemur á fund við nevndina mikudagin 25. mai 2016 fyri at umrøða roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina nærri.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna grannskoðaða roknskapin fyri Fuglafjarðar kommunu fyri 2015 uttan viðmerkingar. (9-0).

**Mál nr. 43/2016.**

**Viðv. eykajáttan til íløgur í eldrabygging.**

Sosiala nevndin hevur á fundi tann 15. februar og 07. mars 2016 viðgjørt málið viðvíkjandi uppskot til Eldraland.

Tvey uppskot/ skitsur eru komnar til bygging av einum eldralandi á Kambsdali. Tað er Teknistovan í Gøtu sum er komin við einum uppskotið og eitt uppskot frá Fuglark í Klaksvík.

Uppskotið frá Teknistovuni í Gøtu sær spennandi og einkult út. Teir hava tekna lonir, sum eru deildar upp, alt eftir hvussu langt tey eldru fólkini eru komin í lívinum. Teir hava tekna íbúðir, eina lon við eldrasambýlið og eina lon sum ellis- og røktarheim. Har eru felags hølir, venjingarhølir, fysioterapi- og ergo-terapirúm við meira.

Frá Fuglark sær tað meira flott og moderna út, men tað er eitt sindur ringt at deffinera tekningina. Fuglark hava ikki havt so góða tíð at sita við uppgávuni, og vilja venda aftur til kommununa við einum meira lidnum uppskotið.

Tá nevndin tosaði um uppskotið hjá Teknistovuni í Gøtu, so er uppskotið í tráð við tað sum Dennis Holm skrivar um í vikuskiftisblaðnum hjá Sosialinum, tann 29. januar 2016.

Í samband við "Skipan av formansskapi, føstum nevndum, øðrum nevndum og umboðum valskeiðið 1. januar 2013 til 31. desember 2016", er ein bólkur valdur til at arbeiða við eldraøkinum.

**Arbeiðs/hugskotsbólkur eldrabygging vm.:**
Sigurð S. Simonsen, formaður í sosialu nevndini
Sigga Óladóttir Joensen, býráðslimur
Eyðun á Lakjuni, býráðslimur
Dánjal Vang. býráðslimur
Magnus S. Midjord, býráðslimur
Miriam á Lakjuni, leiðari á Giljagarði
Elsebeth Viðoy Simonsen, leiðari á Vesturstovu
Irena Olsen, leiðari á sosialu deildini
Unna Næs Petersen, sjúkrarøktarfrøðingur og starvsfólk í Doktarahúsinum

Sosiala nevndin kallaði "hugskotsbólkin" inn til fundar, tann 18. mars 2016 tá tekningarnar vóru klárar frá Teknistouni í Gøtu og frá Fuglark.

Tvey uppskot/ skitsur eru komnar til bygging av einum eldralandi á Kambsdali. Tað er Teknistovan í Gøtu sum er komin við einum uppskotið og eitt uppskot frá Fuglark í Klaksvík.

Tosað var um lonir sum kundu verið bygdar, vardar íbúðir, sambýlið, røktar- og ellislon, dementlon og møguliga eina lon til hospic sum manglar í Eysturoynni.

Rokning er komin frá Teknistovuni í Gøtu á kr. 65.000 sum tekningin kostaði.

Tá rokningin skal konterast, sær út til at eingin peningur er avsettur á fíggjarætlanini hjá kommununi til eldrabygging fyri 2016.

Sosiala nevndin hevur á fundi 17. mai 2016 samtykt at heita á fíggjarnevndina um at seta kr. 200.000 av fyri árið 2016

Sosiala nevndin veit ikki heilt enn, hvørja ætlanir eru við víðari viðgerð av málinum í ár, men vil hava pening avsettan til møguligar uppgávur sum kunnu koma seinni í ár.

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 18. mai 2016, og tekur nevndin tekur undir við áheitanini frá sosialu nevndini, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 200.000,00 til eldrabygging fyri fíggjarárið 2016, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Staðfest er, at eingin peningur er avsettur á fíggjarætlan kommununar fyri 2016 á rakstrarstaði 265 á konto 3131-00: "Íløgur í eldraøkið", og tí verður neyðugt við við eini eykajáttan til nevnda rakstrarstað og konto upp á kr. 200.000,00.

Fíggingin verður fingin til vega sambært § 25 Gjaldføri av innistandandi peningi, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Talan er um pening fyri sølu av "Luffustovu".

Ein eykajáttan, sum henda, førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga avgerð á býráðsfundinum 16. juni 2016. (9-0).

**Mál nr. 44/2016.**

**Umsókn frá SP/F Esmar Simonsen um byggiloyvi til bilverkstað á Kambsdali.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá SP/F Esmar Simonsen, dagfest 11. mai 2016 um byggiloyvi til bilverkstað á matr. nr. 871bk á Kambsenni 5 á Kambsdali sambært hjálagdar tekningar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 18. mai 2016 og vinnunevndini 12. mai 2016, og mæar nevndrnar býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bilverkstað sambært fyriliggjandi tekningar.

Kloakkplanurin skal verða gjørdur soleiðis, at yvirflatuvatn frá uttanumøki ikki verður veitt í oljuskiljaran, og skulu kloakkir verða sýnaðar og góðkendar av teknisku deildini, áðrenn hesar verða tyrvdar.

Eisini skal oljuskiljari verða góðkendur av teknisku deildini.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmælini frá vinnunevndini og teknisku nevndini vórðu samtykt. (9-0).

**Mál nr. 45/2016.**

**Umsókn frá Jóhan Hansen um byggiloyvi til aftratbygging til sethús og til bilhús.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jóhan Hansen, Dalbøgøta 1, 530 Fuglafjørður, dagfest 30. september 2015 um byggiloyvi til aftratbygging til sethúsini á matr nr. 648 og byggiloyvi til bilhús á Dalbøgøtu 1, s.s.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini 18. mai 2016 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvið verður givið soleiðis at

1. Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.

*Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.*

2. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
3. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
4. Tá grivið verður móti kommunalum vegi skal grevstrararbeiði verða gjørt soleiðis at tað ikki verður grivið undan vegnum.
5. Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.

Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá ústkrivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 46/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi reingerð av kommunalum bygningum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið frágreiðing frá PM Pluss um reingerð av kommunalum bygningum, hetta sambært áheitan frá kommununi um at fáa gjørt arbeiði, sum lýsir bygningarnar nærri, eins og mett verður, hvussu nógva arbeiðtíð nýtt eigur at verða til reingerðina vm., eins og hvørjum standi hvør einstakur bygningur er í.

Mentamálanevndin, sosiala nevndin og tekniska nevndin hava viðgjørt málið um reingerðina og mæla nevndirnar býráðnum til, at kommunan skipar ein felags politikk á økinum, og at reingerðin av øllum kommunalum bygningum verður boðin út.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. mai 2016 og varð avgerð tikin um at beina málið til býráðið til endaliga viðgerð og støðutakan uttan nevndartilmæli.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í fyrisitingina til víðari viðgerðar, eitt nú við atliti til uppskot til lýsing, og at greina spurningin um viðurskiftini hjá verandi reingerðarfólkum í samband við eina møguliga útbjóðing av reingerðini av kommunalu bygningunum. Málið verður lagt aftur fyri komandi býráðsfund 16. juni 2016.(9-0).

**<u>Mál nr. 47/2016.</u>**

**Mál viðvíkjandi bygging av nýggjum barnaskúla.**

**Tilmæli**

Á býráðsfundi 28. Januar samtykti býráðið fyri Fuglafjarðar kommunu at seta eina bygginevnd at fyrireika bygging av nýggjum barnaskúla í Fuglafirði. Arbeiðssetningurin ljóðaði soleiðis.

*Bygginevndin skal lýsa tørvin hjá Fuglafjarðar skúla. Við støði í tørvslýsingini, skal bygginevndin koma við tilmæli um heildarætlan, bygging og innrætting av skúlanum. Umframt nýggjan barnaskúla, sum er grunddeild og miðdeild, skulu atlit takast til framtíðar dagføring av framhaldsdeild og møguligar aðrar útbyggingar. Byggiskráin skal eisini umfata umstøður til tónleik, hornorkestrið, savningarstað (aula/kantina) og hølir til heimkunnleika.*

*Bygginevndin skal samskifta við allar viðkomandi partar og soleiðis tryggja, at allar viðkomandi upplýsingar verða tiknir við í tilmælinum.*

*Tilmælið fevnir um byggiskrá, sum yvirskipað lýsir tíðarætlan, kostnaðarkarm, námsfrøðilig og teknisk atlit*

Í bygginevndina vóru hesi vald
Eyðun á Lakjuni formaður í mentamálanevndini, (formaður)
Ólavur Thomsen, skúlastjóri
Pætur Joensen býarverkfrøðingur
Rønn Eliassen, mentamálaleiðari

Fía Jacobsen, lærari
Gudny Vang, skúlastýrisformaður

Til uttanhýsis ráðgeva valdi býráðið  Rúna Abrahamsen arkitekt

Seinni valdi býráðið ein politiskan fylgibólk, sum var mannaður av:
Sonna í Horni borgarstjóra
Jan Toftegaard
Magnus Midjord
Siggu Óladóttir Joensen

Bygginevndin hevur hildið 9 fundir og hevur vitjað 14 skúlar 8 í Føroyum og 6 í Danmark.
Bygginevndin hevur eisini hildið fundir við hesar brúkarabólkar:

- Kvøldskúlaleiðaran
- Hornorkestrið
- FS Svimjifelagið
- Badmintonfelagið
- ÍF Flogbóltur
- Flog
- Gigni
- Musikkskúlin
- Lærarar og starvsfólk
- Næmingar
- Fuglafjarðar sangkór
- Kambur

Bygginevndin er komin til ta niðurstøðu, at byggja ein skúla, sum er 3.200$m^2$ til víddar. Í skúlabyggingini er eisini ein dupult fimleikarahøll, forskúli, frítíðarskúli, umframt bókasavn, kantina, felagshøll og floksstovur.

Kosnaðurin fyri alla byggingina er 96 mió. íroknað byggiútreiðslur, ráðgeving, innrætting av útiøkjum, útreiðslur til fast og leyst innbúgv, aktiva útgerð s.s. teldur, samvirkistalvur o.l. og íroknað MVG.

Bygginevndin er einmælt samd um byggiskránna við undantak av tí parti av grunddeildini, sum snýr seg um forskúla og frítíðarskúla. Her hevur bygginevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta, har meirilutin mælir til at byggja forskúla og frítíðarskúla sum part av grunddeildini, meðan minnilutin mælir til at forskúla- og frítíðartilboðið Kambur, sum vit kenna tað, fær til húsa í skúlanum og á skúlans øki, men sum ein sjávstøðug- og sjálvstýrandi  eind.

Meirilutin, sum er Eyðun, Ólavur, Fía, Pætur og Rønn grundgevur fyri sínum tilmæli, at Fólkaskúlaráðið í 2011 mælti til at børn fara í forskúla. Hetta er eisini eitt rák sum er rundan um okkum, bæði í grannalondum og í grannabygdum okkara. Meirilutin ynskir eisini at fylgja kunngerðini " um skipan og læring í forskúla", sum ásetur, at tað er skúlaleiðarin, sum hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum við tilvísing til kommununa. Sama kunngerð ásetur eisini, at í forskúlaflokki skulu starvast bæði lærari og pedagogur og at lærarar og pedagogar skulu í felag fyrireika og samskipa virksemið í forskúlanum, so tað verður samanhangur millum læring og leik.

Minnilutin, sum er Gudny grundgevur fyri síni niðurstøðu, at verandi tilboð, sum er á Kambi, er gott og riggar væl og eigur at halda fram uttan at verða broytt. Minnilutin metur, at hetta er eitt stórt stig at taka, sum eigur at verða viðgjørt saman við námsfrøðingum, sum eisini áttu at verið partur av bygginevndini.

**Tilmæli frá mentamálanevndini:**

Mentamálanevndin hevur á fundi 17. mai 2016 viðgjørt byggiskrá og tilmæli frá bygginevndini fyri bygging av nýggjum barnaskúla í Fuglafirði.

Tað er ein samd mentamálanevnd sum tekur undir við tilmælinum frá bygginevndini og sostatt ein samd mentamálanevnd, sum mælir til at leggja tilmæli frá bygginevndini fyri býráðið.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilkmælunum frá byggibólkinum og mentamálanevndini um bygging av

nýggjum barnaskúla við niðan fyri standandi ískoytum (9-0):

- Bygnaðurin av forskúla (0-flokki) og frítíðarskúlanum er ikki unfataður av samtykt býráðsins. Um broytingar skulu verða gjørdar, so verður hetta eitt mál, sum býráðið skal viðgera og taka avgerð um til ta tíð.
- Teksturin í tilmælinum frá byggibólkinum um kostnað verður broyttur soleiðis, at Kostnaðurin fyri alla byggingina verður mett, at eitt vegleiðandi boð er kr. 96,0 mió.

Viðmerking frá Dánjali Vang. 2.19. Barnatannrøkt. "Hølir til barantannrøktina og vaksin verður flutt frá 2. til 1. byggistig".

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.10.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Jann N. Toftegaard

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen